# TÍÐINDI

SAMBAND
KÁRI MIKKELSEN
KARIM@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Hvalbingar bíða eftir hjálp

**Landskassin rindaði ein part av skaðanum, sum ódnin gjørdi í Skálavík í vetur, men ongin í samgonguni vil lova hvalbingum somu sømdir, hóast talan var um nógvar ferðir størri skaða**



*Ongin vil lova hvalbingum somu sømdir, sum skálvíkingar hava fingið*


# Deildarleiðari fyri Lendi

*Starv sum deildarleiðari fyri Lendi á Umhvørvisstovuni er leyst at søkja.*

Lendi fyrisitur lóggávu innan matrikulerings- og útskiftingarøkið. Eisini luttekur deildin í fyrisiting innan býarskipan og aðra planlóggávu. Endamálið er at tryggja, at henda lóggáva verður hildin.

Arbeiðið umfatar serliga framhaldandi at menna eina vælvirkandi fyrisiting innan matrikulumsiting, marknaáseting og lóggávurøkt. Eisini fatar starvið um matrikulera ráðgeving og kunning innan lendisfyrisiting.

Starvið fatar somuleiðis um at menna ein burðardyggan hugburð í samfelagnum, at veita ráðgeving og at menna eina virkna og góða arbeiðsmentan.

**Førleikar**
Umsøkjarin skal hava prógv innan landmáting, verkfrøði, løgfrøði ella líknandi frá hægri læristovni. Eisini er tað ein fyrimunur at hava royndir við matrikulerum arbeiði, útskifting og uppmáting. Tað er somuleiðis ein fyrimunur at hava royndir innan leiðslu og fyrisiting, hava góð samstarvsevni og hava hug at menna tað fyrisitingarliga arbeiðið á stovninum. Eisini skal umsøkjari hava góðan telduførleika og málførleika í føroyskum, donskum og enskum.

**Starvsmøguleikar**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar og góðar møguleikar fyri persónligari menning.

**Setan**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Fyrispurningar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:
Jákup Paula Joensen, stjóra, jakuppj@us.fo og tlf 34 24 00.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 25. juni 2008..

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38
Postboks 2048
FO-165 Argir

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvismál og viðarvøkstur og frílendir.*

samsir.fo


**NÁTTÚRUVANLUKKA**

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Enn er óvist, um landsstýrið fer at hjálpa hvalbingum at gera skaðan aftur, sum ódnin í vetur elvdi til á grótkastið við havnarlagið í bygdini.

Grótgarðurin fór so illa, at mett verður, at tað fer at kosta einar 11 milliónir at gera hann aftur í fullgóðan stand aftur.

Hetta er eitt arbeiðið, sum undir ongum umstøðum kann bíða og tí er kommunan longu farin undir at umvæla skaðan, so at arbeiðið kann vera liðugt, áðrenn veturin kemur av álvara.

Av tí, at talan er um so stóra upphædd, hevur kommunan avtalað við byggifyritøkuna, at hon betalir helvtina av kostnaðinum í ár og hina helvtina tey bæði næstu árini.

## Rímiligt at landið hjálpir

Men av tí, at talan er um eina so ovurstóra, óvæntaða útreiðslu og av tí, at talan harafturat er um eina náttúruvanlukku, hevur Hvalbiar Bygdaráð hildið, at tað er rætt og rímiligt, at landið betalir ein part av útreiðslunum og tí hevur bygdaráðið heitt á Løgtingið um fíggjarligan stuðul at umvæla skaðan fyri.

Í hesum sambandi kann vísast á, at eftir at stórur skaði hendi í Skálavík, játtaði løgtingið skálvíkingum 400.000 krónur í stuðuli, sum eina hjálp til at gera arbeiðið aftur fyri.

Men enn hava hvalbingar so onki frætt aftur frá politisku skipanini.

Og tað er kanska ikki so løgið, tí áheitanin frá hvalbingum er hvørki viðgjørd og enn minni avgreidd í politisku skipanini.

Og tað er heldur ongin í samgonguni, sum yvirhøvur vil lova hvalbingum fíggjarligan stuðul úr landskassanum til endamálið.

Bjørt Samuelsen, landsstýriskvinna í vinnumálum, staðfestir, at hon hevur onga játtan til taks at brúka til endamál, sum hetta.

At skálvíkingar fingu 400.000 frá landinum, var ein avgerð, sum Løgtingið tók í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Hon hevur ikki sæð nakra umsókn frá hvalbingumum um fíggjarligan stuðul og eftir at hon hevur kannað málið, er hon komin eftir, at tað er tí, at hvalbingar bara hava sent áheitanina til Løgtingið.

## Undarligt at seta hvalbingar eftir

Nú fer hon so at bíða og vita, hvat Løgtingið ger við áheitanina.

Men hon viðgongur eisini, at tað kann tykjast eitt sindur undarligt at játta skálvíkingum fíggjarligan stuðul til eina náttúruvanlukku, men at nokta hvalbingum somu sømdir, hóast talan var um nógv meiri umfatandi skaða.

*Kunnu hvalbingar so vænta sær nakran stuðul?*

- Nú mugu vit fyrst viðgera málið og kanna eftir, hvørjar skaðar, talan er um o.s.fr., sigur Bjørt Samuelsen.

Heldur ikki Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í kommunumálum, vil lova hvalbingum fíggjarligan stuðul.

Hon staðfestir, at ongar greiðar mannagongdir eru um slíkt og at Løgtingið í evstu løtu undir fíggjarlógarviðgerðini játtaði skálvíkingum fíggjarligan stuðul, er bara eitt dømi um, at Løgtingið ger eina samtykt í óðum verkum, uttan kanska at hugsa ov nógv um, hvat hetta kann føra við sær í longdini og uttan at hugsa um, hvat fordømi hetta skapar.

Men eisini Helena Dam á Neystabø ásannar, at tað kann vera tórført at nokta hvalbingum stuðul, nú skálvíkingar longu hava fingið.